## DAGSINS MEINING

# Sorgardagur fyri demokratiska heimin

Tað var ein sannur sorgardagur fyri demokratiska heimin, tá túsundtals fólk lótu lív í USA fyrradagin. Atsóknin móti sivilum í New York er tað grovasta heimurin hevur sæð síðani annan veraldarbardaga. Ongantíð áður hevur tað verið so týdningarmikið hjá demokratiska heiminum at leggja dent á, at einki mál nakrantíð kann rættvísgera eina slíka níðingsgerð. Mannalív hava einki at siga hjá slíkum atsóknarmonnum. Fanatisma og fundamentalisma eru stórsti vandin í heiminum í dag, óansæð hvar hesi finnast.

Fíggindamyndin er ikki so greið í dag, sum hon var undir kalda krígnum. Fíggindin í slíkum atsóknum sum fyrradagin kann sita nærum hvar sum helst í heiminum, hóast upprunin ivalyest er í miðeystri ella islamiska heiminum. Tað er bara at vóna, at slíkar atsóknir geva bakslag hja teimum, ið hava framt tær. Atsóknin verður fordømd frá nærum øllum síðum eisini felagsskapum í miðeystri, sum annars nærum altíð eru kritiskir yvirfyri USA og vesturheiminum.

Ilt er at siga hvørjar avleiðingarnar av 11. septembur atsóknini verða. Partabrævamarknaðirnir reageraðu stak negativt. Stórt fall var at síggja á nærum øllum slag av partabrøvum. Tað einasta, ið vísir seg at fara kraftiga upp, er oljuprísurin, sum so aftur fer at merkjast, ikki minst her hjá okkum.

Álitið á eina friðarliga framtíð styrknaði ikki 11. septembur, men heimsterrorisman skal ikki sita við sigrinum, og tí er tað alneyðugt, at demokratiski heimurin stendur fattur. Einki mál eigur at verða rokkið við harðskapi, tí eingin søk, tað verði seg átrúnarlig, nationalistisk ella annað rættvísger slíkt. Umráðandi er at finna tey seku. Hetta er ein torfør uppgáva fyri leiðsluna í USA. Amerikanska fólkið krevur hevnd fyri hesa beistagerð. At USA enn ikki hevur brúkt sína hernaðarligu styrki vísir, at landið ætlar sær ikki at gera nakað mistak, sum so aftur kann verða atvoldin til fleiri atsóknir. Men okkurt er í væntu. Greiðu útmeldingarnar um, at stjórnir, ið hýsa hópdrápsmonnum, verða mettar samsekar, siga ikki so lítið.

Verður ikki rætt farið fram kann vanlukkan gerast enn størri. Vit kunnu bara gita, hvat eitt álop á eitt ella fleiri arabisk lond kann hava við sær av hevnd frá teirra síðu. Tankin um at plasera kjarnorkubumbur í amerikonskum umhvørvi hoyra enn sciencefiction lesnaðni til. Men tá hugsað verður um atsóknirnar í New York og Washington kann verða spurt, hvussu veruleikafjarur tann tankin er. Higartil hevur Miðeystur verið mett sum ein tikkandi bumba. Brádliga tykist allur heimurin at verða ein tikkandi bumba.

**Sosialurin**

# M.A. Jacobsens heiðursløнir handaðar mánadagin

TÍÐINDASKRIV

Mánadagin 17. sept. kl. 5 seinnapartin handar Tórshavnar kommuna Mentanarvirðisløнir M.A. Jacobsens og Barnabókaheiðursløн Tórshavnar Býráðs í Sjónleikarhúsinum.

Í 1958 varð ein reglugerð gjørd fyri bókmentavirðisløn M.A. Jacobsens og tvær virðisløнir vórðu fyrstu ferð latnar sama árið. Reglugerðin fekk heitið: *Reglugerð fyri Bókmentavirðisløn M.A. Jacobsens.*

Í 1972 varð gjørt av, at onnur lønin átti at verða latin fyri fagrar bókmentir og onnur fyri yrkisbókmentir.

Í 1985 kom í reglugerðina, at býráðið kundi samtykkja at lata eina løn afturat, um nevndin helt eitt verk hava bókmentaligt virði, men vera torført at flokka sum annaðhvørt fagurbókmentaligt ella yrkisbókmentaligt.

Í 1996 samtykti Tórshavnar býráð at broyta navnið og reglugerðina. Heitið er nú *Mentanarvirðisløнir M.A. Jacobsens*. Nevndin hevur heimild at lata tríggjar virðisløнir, eina fyri fagurbókmentir, eina fyri yrkisbókmentir og eina fyri mentanaravrik. Virðisløнin fyri mentanaravrik kann verða latin fólki, sum hava gjørt eitthvørt, sum hevur týdning fyri føroyska mentan. Nevndin hevur heimild at gera av ikki at lata onkra av virðisløнunum, um hon heldur, at einki verk ella avrik er virðisløнarvert. Í ár verða tríggjar latnar.

Í nevndini fyri Mentanarvirðisløнir M.A. Jacobsens eru fimm limir: Býráðið velur tríggjar, Rithøvundafelagið ein og Fróðskaparsetur Føroya ein. Nevndarlimirnir verða valdir eftir hvørt býráðsval. Eftir býráðsvalið síðsta heyst er nevndin sostatt vald av nýggjum. Býráðið hevur valt Egon Hansen og Jákup Jacobsen at halda fram. Erling Isholm er nýggjur limur. Rithøvundafelagið valdi Gunnar Hoydal aftur. Fróðskaparsetrið valdi Turið Sigurðardóttur. Eingin formaður er í nevndini. Býarbókavørðurin er fastur skrivari, tað er Anna Brimnes.

Barnabókaheiðursløнir Tórshavnar Býráðs vórðu fyrstu ferð handaðar í 1976. Heiðursløнirnar verða latnar fyri bóka- og listaverk fyri børn, sum verða hildin at vera virðisløнarverd. Tær kunnu latast rithøvundum, týðarum og listafólkum. Í mesta lagi ber til at lata tvær løнir. Í ár verður ein latin. Í nevndini í barnabókaheiðursløнirnar eru somuleiðis fimm limir. Formaðurin í mentamálanevnd Tórshavnar kommunu er fastur limur og fastur formaður í nevndini. Ein barnabókavørður er fastur limur og skrivari í nevndini, tað er Malan Hilmarsdóttir.

Nevndin verður vald av nýggjum eftir hvørt kommunuval. Í fjør heyst varð Heðin Mortensen formaður í mentamálanevndini og er sostatt eisini formaður í nevndini fyri barnabókaheiðursløнirnar. Tórshavnar kommuna hevur valt Hildur Eyðunsdóttir og Poulinu Slættanes í nevndina. Felagslærarаráðið hevur valt Hervør Jákupsson.

# Fiskikapping og fiskikappingardansur í Klaksvík

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 15. sept. verður árliga fiskikappingin í Norðoyggjum.

Eins og undanfarnu ár verður skipað fyri fiskikapping og fiskikappingardansi, og er tað fyri allar Norðoyggjar. Tað er stuðlafelagið »Dragin« – KG 212, ið skipar fyri.



**Luttøkutreytir**
Treytirnar fyri luttøku eru tær somu sum undanfarnu ár, tó við tí broyting, at seiður nú ikki telur við í vektini. Bátarnir fáa luttøkuskjal umborð í Draganum frá kl. 7.30 og kunnu teir fara frá landi kl. 8 og í seinasta lagi kl. 5 seinnapartin skulu teir vera aftur á landi. Av trygdarorsøkum skulu minst tveir mans vera við hvørjum báti. Tað er bert loyvt at nýta snøri, snellu ella tráðu sum veiðireiðskap.

**Vinnararnir fáa steyp til ognar**
Tann bátur, sum hevur størst veiðu pr. mann, verður vinnari. Manningarnar á trimum teimum bestu bátunum fáa steyp til ognar og verða steypini handað manningunum tá liðugt er at viga veiðuna – umleið kl. 8.

Aftan á fáa manningarnar kaffi og pannukøkur umborð á Draganum.

**Fólk kunnu keypa sær at kóka**
Fiskurin verður lagdur upp við bátabrúgvarnar á Vánni. Kl. uml. 17.30 byrjar fiskauppboðssølan, har fólk hava høvi at keypa sær fisk til at kóka ella hanga upp. Uppboðssølan verður í uml. ein tíma.

**Fiskikappingardansur í Skálanum kl. 23**
Um kvøldið verður gamlamannadansur í Skálanum, og er tað tann kendi contrybólkurin úr Klaksvík sum spælir.

Peningurin, sum kemur inn frá fiskikappingini og dansinum, fer óskerdur til »Dragan«, sum verður bygdur um til skúlaskip.

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Nú nervist eg!

**Jörmund Vágadal**



Í Útvarpinum í kvöld hoyrdi eg, at hash-hundurin hjá lögregluni hevði fingið eina lönarhækking uppá ca. 3000 krónur um mánaðin — eg rokni við, at hetta er fyri uppihald, sjónvarp, mat og klæðir, kamar, internet, telefon og annars ferðakostnaður vestur á flogvøllin og koyring oman á bryggjuna í Havn. Upphæddin svarar til ellispensjónina sum okkara gomlu skulu klára seg fyri.

Í somu útvarpssending verður sagt, at løgmansstjórin, Marjun Hanusardóttur og hennara aðalstjórar — eg haldi teir eru einir 5-6 í tali- høvðu fingið eina lönarhækkan ella viðbót uppá —minnist meg rætt, so var talan um einar 4.000 krónur um mánaðin — og hetta var bara, sum russiski fótbóltsvenjarin segði her fyri, ein avgreiðsluspurningur — eitt sokalla ískoytið til verandi lönina. Eg kom at hugsa um Ingeborg og Abramsen. Viðbótin svarar til eina meðal lönarhækkan uppá 25% var talan um eina vanliga arbeiðaralön.

Eg roknið við at Annfinn Kalsberg og Óli Breckmann hava góðtikið hesar merkiligu almennu lönarhækkingarnar. Nú er tað vorði “in” at arbeiða hjá tí almenna. Her eru störstu lönirnar.

**Hetta er merkiligt?**
At avgreiða lönina hjá einum hundi og gjalda 3000 krónur um mánan á posthúsinum til ein hund, hetta finna tit eina loysn uppá.

Men tit finna ikki útav at geva okkara minni mentu og gomlu sömilig kor at liva undir ella okkara sjúku sömiliga viðgerð, men ein hund, tað loysa tit við einum pennastroki — hetta mátti verið flovisligt fyri onkran, harra lögmaður.

Við einum pennastroki geva tit teimum meira, sum hava nokk frammanundan og fær hetta ein at undrast og nervast um hetta skal verða skilið í framtíðini við fullveldinum og einum nýggjum kongi.

Finnboga Ísaksson kenna vit — teir eru vinstrahallir sosialistar og upprörsmenn og kráma til sín tað teir kunnu. Teir fegnast yvir at almennu lönirnar eru tær mest attraktivu í samfelagnum. Hetta er sosialistiska leiðin.

Ein hevði vóna at hetta ikki bleiv endin, men lítið rökist fyri at tykkara kráman eftir pengunum fær nakran enda.

Hava tit ikki nokk? Mangla tit pengar heima við hús? 36.000 krónur um mánaðin, hví skulu tit og hasin hundurin hava meir?

Tit fáa onki við tykkum, tá tit fara hiðani. Var peningurin ikki betur farin til sjúkrahús, almenna viðgerð, skúlar o.a.? Hví skulu tit altíð kráma til tykkum — pengar, sum tit onki eiga í, men sum onnur hava stríðst fyri. Boksarin Mike Tyson segði herfyri við fjölmiðlarnar, at tað eru tvey slög av menniskum til: tey sum forvinna pening og so öll hini, sum royna at stjæla peningin frá tær.

Skammast tit ongantíð? Ella halda tit verunliga at tit eru allar hesar pengarnar verd?

Annars so ætli eg mær at sökja starvið sum kongur í Föroyum, tá starvið verður lýst leyst. Nú vóni eg ikki at Vágadal navnið er ov lítið fínt í mun til Hoydal, Kallsberg, Breckmann, Mohr, Ellefsen, Djurhuus v.m.

# LÍV

brakandi
brestur
frumbyrjan
megnarlop
á
dunandi
aldu
skolandi
neistar
í
kvidnar
tíðir
berandi
í
barmi
óteljandi
fon
gitin
við
lívi

lívi
litið
okkum til
til varðveitslu
sum
lán
at
umsita
og at
lata
aftur
eftir
tilmált
æviskeið

**Erling S.**

# Motorsúkklutúrur

TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 15. september skipar Føroya-MC fyri einum felagstúri, har allar motorsúkklur í Føroyum eru vælkomnar.

Nú dagarnir styttast, og summarið má sigast at vera av, eru dagarnir, har møgu - leiki er at koyra motorsúkklu vornir færri, og tí skipar felagið fyri einum felagstúri, har øll motorsúkklufólk kunnu møtast og hugna sær, og tosa um, hvussu hetta motorsúkkluárið hevur verið.

Sigast má, at árið í ár hevur verið eitt hendingaríkt ár fyri tey, sum hava áhuga fyri motorsúkklum, tí óvanliga nógvar motorsúkklur eru komnar til landið í ár - einar 25 - 30 súkklur, harav 2 nýggjar.

Eisini fyri Føroya-MC, sum var stovnað í september í fjør, hevur árið verið sera hendingaríkt.

Felagið hevur fingið nógvar nýggjar limir, og eru nú yvir 100 limir skrásettir, sum má sigast at vera sera nógv. Limirnir hava í ár fingið 3 limabløð, og eitt kemur afturat 15. oktober. Nevndin hevur eisini skipað fyri fleiri tiltøkum í summar, m.a. orienteringskoyring og ymiskum felagstúrum. Og eisini er gjørd ein telefonketa, soleiðis at øll kunnu fáa boð um, nær koyrt verður, tá ein góður dagur er, og hevur ketan verið nógv nýtt. Til dømis hava motorsúkklur vitjað á flest øllum stevnunum, ið hava verið kring landið, og tá góðveður hevur verið, hava flestu fólk ivaleyst møtt motorsúkklum á ferð.

Føroya-MC leggur dent á, at tiltakið leygardagin ikki bert er fyri limir, men øll motorsúkkluáhuga eru vælkomin. Túrurin verður til Tjørnuvíkar,har kaffi og køkur verða at fáa, og um veðrið verður gott, verður væntandi koyrt ein túr til Saksunar eisini.



Føroya-MC vónar at síggja nógvar motorsúkklur leygardagin, sum væntandi verður síðsta tiltakið í ár; og so er bert at vóna, at veðrið verður tilvildar.

# Magistarar gjørt sáttmála

TÍÐINDASKRIV

Magistarafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið hava tann 11. september 2001 gjørt sáttmála, ið er galdandi frá 1. mars 2001 til 1. oktober 2003. Sáttmálin gevur limum felagsins eina samlaða lønarhækking uppá umleið 12%. Við sáttmálanum er eydnast at fáa staðfest meginregluna um, at øktur førleiki gevur hægri løn. Við øðrum orðum gevur sáttmálin møguleika fyri størri lønarligum fjølbroytni og lønarliga viðurkennir phd førleika.

Í sáttmálanum er eisini semja um eina nýggja lønarskipan samansetta av einari grundløn við 12, og ikki sum higartil 15, stigum, og einum førleikalønarstiga, ið gevur møguleika fyri neyvari áseting av løn í mun til krøv um útbúgving, førleika og ábyrgd. Eftirlønargjaldið er eisini broytt soleiðis, at arbeiðsgevarin rindar alla eftirlønina, 13,5%, av grundløn og førleikaløn. Skipanin higartil, har starvsfólkið rindaði 5% av grundlønini og arbeiðsgevarin 10% dettur sostatt burtur. Nýggja skipanin tryggjar øllum limum somu eftirløn sum higartil.

Broytingar eru somuleiðis í sjálvum sáttmálatekstinum og semja er gjørd um 2 protokollat: eitt um setanarviðurskifti hjá Ph.D-lesandi og eitt um arbeiðstíð o.a. á Føroya Læraraskúla.

Harumframt er notat skrivað, sum staðfestir at hátturin at áseta ferðaendurgjald fyri tænastuferðir hevur verið umrøddur, og at Fíggjarmálastýrið sigur seg sinnað at gera avtalu, sum umfatar fleiri feløg. Í notatinum verður eisini staðfest, at partarnir eru samdir um, at gongd kemur aftur á arbeiðið at gera uppskot til reglugerð fyri virksemið hjá samstarvsráðunum.

Nevndin í Magistarafelagnum heldur sum heild, at vit hava fingið eina liðiligari, meiri tíðarhóskandi og framtíðarvendari lønarskipan - eina skipan, ið kann vera við til at skapa menningarmøguleikar hjá starvsfólkum og stovnum.

…….

Sáttmálin og nýggja lønarskipanin verða at finna á heimasíðuni hjá Lønardeildini: www.lnd.fo